# Í Noregi við sild

Gøtuskipini Tróndur í Gøtu og Finnur Fríði hava verið Noregi og landað sild. Finnur Fríði kom til Liavåg tíðliga í morgun, har teir skuldu landa góð 500 tons, og Tróndur í Gøtu var í Liavåg í gjár og landaði um 530 tons. Sildin er góð, og meðalvektin var beint niðan fyri 400 gram. Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu hava partrolað hendan túrin, og teir fingu sildina í altjóða sjógvi norðuri á 69 stigum, skrivar reiðaríið á heimasíðuni.



# Íslendingar á Jan Mayen

Umboð fyri íslendsku sjóverjuna hava verið á Jan Mayen og kunnað seg um umstøðurnar har. Millum annað fingu gestirnir eina frágreiðing um veðurstøðina, loranstøðina og annan útbúnað, sum er har. Teinurin millum Ísland og Jan Mayen er um 320 fjórðingar, og málið við ferðini var at kanna, um íslendsk leitingarflogfør kunnu brúka Jan Mayen til millemlendingar eftir brennievni í sambandi við leiting og bjarging norðanfyri.

fer fyri tingið seinni í hesum mánaðinum, segði landsstýrismaðurin.

Báðar verkætlanirnar eru við í fíggjarlógini fyri í ár og í uppskotinum fyri komandi ár.

### Nýggj psykiatrilóg

Psykiatriska økið er ógvuliga breitt, og landsstýrismaðurin nevndi, at barna- og ungdómspsykiatrisk konsulenttænasta er sett á stovn fyrst í hesum samgonguskeiðinum. Hetta er ein skipan, sum síðani er víðkað og ment, bæði í ár og ætlandi komandi ár.

Somuleiðis er arbeitt við at betra um tilboðini í hinum endanum av skalanum, so at siga, nevniliga ellispsykiatri, sum nú verður skipað.

Ein onnur spennandi menning innan økið er, at reglulig tiltøk støðugt verða sett í verk fyri at menna viðgerðir og førleikar hjá starvsfólkunum. Her nevndi landsstýismaðurin ítøkiliga:

- Síðsta vetur vóru fyrstu prógvini handað í samband við verkætlanina á Psykiatriska Deplinum um at útbúgva fyrrverandi sjúklingar sum serstøk starvsfólk við brúkararoyndum.

Eisini eru ítøkiligar ætlanir um nútímansgerð av Psykiatriska Deplinum.

Eitt annað, sum landsstýrismaðurin legði stóran dent á, er, at verandi psykiatrilóg er gomul, heilt frá 1938. Men nú er so ein nýggj á veg. Hetta er ein lóg, sum í mestan mun miðar ímóti at nútímansgera øll viðurskifti í sambandi við psykiatriina.

- Lógin er ávegis og verður løgd fyri tingið síðst í oktober, segði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

### Lívligt orðaskifti

Til orðaskiftið vóru eisini boðin umboð fyri politisku flokkarnar, og møtt vóru Lisbeth L. Petersen fyri Sambandsflokkin, Jørgen Niclasen fyri Fólkaflokkin, Finnur Helmsdal fyri Tjóðveldi, Andreas Petersen fyri Javnaðarflokkin, Bill Justinussen fyri Miðflokkin og Anna Louisa Joensen fyri Sjálvstýrisflokkin.

Hesi seks høvdu eitt stutt innlegg í part, og síðani varð høvið hjá fundarfólkinum at seta fram spurningar og viðmerkingar. Og talan gjørdist um eitt drúgt og lívligt orðaskifti, tí nógv høvdu okkurt upp á hjarta.

Fólk høvdu nógv at spyrja um og nógv at finnast at. Nógv snúði seg um bústaðarviðurskifti og arbeiðstilboð, og eyðvitað høvdu samgonga og andstøða hvør sína loysn upp á tað sum í so mongum øðrum førum. Yvirhøvur var tað soleiðis, at fundarfólkið, sum spurdi og gjørdi viðmerkingar, fekk rungandi klapp, meðan politikararnir vórðu møttir við eini nærmast háðandi kvirru.

Men har vóru eisini positivar afturmeldingar frá fundarfólkinum, treyðugt so.

Politikararnir hildu, at tað hóast alt var hent nógv á økinum seinastu árini, fundarfólkið var minni sannført um, at so var. Øll tóktust tó samd um, at enn var langur vegur á mál.



*Talan var um Trapputing í orðsins sanna týdningi. So nógv fólk var samankomið, at fleiri máttu reint bokstaviliga seta seg í trappuna, vildu tey hoykja bakendan niðurat*

*Mynd: Jan Müller*



*Egi Dam og Katarina Nolsøe førdu fram brot úr leikinum »Eitur nakað land weekend« hjá Jóanes Nielsen*

*Mynd: Leo Poulsen*